# Miðlamjarr

Fit for fight
ella fitt og feit
***Kvinna, 38 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale / Inna Törnroos



*Í dag er arbeiði, men eg kann ikki vita, hvussu tað verður um eina viku*

Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood, um støðuna í fyritøkuni, sum hevur rakstrarfígging frá Eik Banka. (Dimma)



*Líkt er til, at Hermann Oskarsson seinastu tíðina hevur lagt seg eftir at skjóta alt, sum eg komi við, til »devils og dólg«*

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, er troyttur av atfinningum frá stjóranum á Hagstovuni.



*Um tú ikki kastar skuggar, stendur tú ikki í ljósinum*

Songkvinnan Lady Gaga hugleiðir um lívið



*Eg eri bara eg. Eg eri ikki nakar góður sangari ella tónleikari, men tað er týdningarmikið fyri meg, at tað verður sungið við lív og sál*

Countrysangarin Hallur Joensen tosar um sín tónleik (V)

Eg kann samanlíknast við sjokolatu... eitt sindur ov feit, men alíkavæl so ótrúliga lekkur!
*– Viðmerking frá mannligum vini: Sama her men við nøtum*
***Kvinna, 39 ár***





*Tað var nokk eitt mistak, at eg ongantíð bleiv mamma. Tað var ikki eitt tilvitað val, men eg útsetti tað bara allatíðina*

Danska songkvinnan Birthe Kjær á gamalsaldri

*Hetta svarar til at leggja skatt á øll tey, sum eita Petersen til eftirnavn – og ongan annan*

Tingmaðurin Magni Laksáfoss um ætlanina at leggja eykaskatt á útvaldar vinnur. (Sosialurin)



Var bókin »Gone with The Wind« um Suður-statirnar ella Suðuroyarsiglingina?
***Maður, 45 ár***

Man kann fáa koppar við og uttan hald, Dimmu við og uttan hald, OG so ber eisini til at fáa fólk við og uttan hald. Eg eri VIÐ hald. Av!
***Kvinna, 40 ár***